# Kjakevnið um Johan Dahl strikað

**Í fimm dagar stóð eitt kjakevni á heimasíðuni hjá Tjóðveldisflokkinum, har Johan Dahl varð lagdur undir stuldur, men eftir at Sosialurin gjørdi vart við málið í gjár, er kjakevnið strikað**

INSINUATIÓN
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Eftir at Sosialurin gjørdi vart við, at eitt kjakevni kallaðist "Dahl gjørt ein Jørgen", har ein kjakstovnari róði framundir, at Johan Dahl skuldi havt "lænt" maskinur frá Føroya Fiskavirking uttan at siga frá, er hetta kjakevnið nú strikað.

Bæði Johan Dahl sjálvur og Meinhard Jacobsen, stjóri á Føroya Fiskavirking, avsannaðu hesi leysatíðindi.

Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins, metti málið vera sera óheppið. Hann upplýsti, at floksskrivstovan hevði verið stongd síðan 14. juli, tá kjakevnið varð stovnað, og at eingin webmastari hevði ansað síðuni hesar dagarnar.

Kjakið á síðuni hevur annars verið opið, og tí hevur borið til hjá dulnevndum at viðgera navngivin fólk, til ein webmastari hevur tikið dagar ímilum, hvat var borðbært og hvat var ósømiligt.

Nú er so líkt til, at síðan aftur verður ansað, tí kjakevnið "Dahl gjørt ein Jørgen" hvarv í gjár av heimasíðuni hjá Tjóðveldisflokkinum.

*Nú er líkt til, at kjakið á heimasíðu Tjóðveldisfloksins aftur verður ansað*





*- Michael Tait var drívmegin í DC Talk og hevur gjørt tey flestu løgini hjá tí bólkinum, harímillum hittið Jesus Freak, fortelur Eyðun Jacobsen.*

# Michael Tait, úr DC Talk, til Føroya

**Í dag bleiv tað almennakunngjørt, at Fjarðafestivalurin hevur fingið avtalu við Michael Tait úr heimskenda bólkinum DC Talk. Fyrireikararnir eru sera væl nøgdir við at fáa Tait á festivalskránna, tí hetta er millum tey størstu nøvnini í gospel-tónleiki yvirhøvur, siga teir. 22 nøvn verða á skránni.**

FESTIVALUR
*Johan Jacobsen*
*Johan@sosialurin.fo*

Tíðindafundurin í morgun varð hildin í Kelduni í Skálabotni. Tríggir av fyrireikararunum Terji Vestergaard, Vinjar Johansen og Eyðun Jacobsen søgdu nakað um skránna hjá festivalinum og ætlanirnar við hesum tiltakinum. Festivalurin fer at hava 22 nøvn at bjóða teimum vitjandi í døgunum 24.-25. august. Og, sum fyrireikararnir søgdu, so er hetta helst tað største kristna tónleikaliga tiltakið nakrantíð í Føroyum við 6 útlendskum nøvnum.

- Vit fara at bjóða teimum vitjandi eitt show og serliga eina góðsku, sum vil nakað. Soleiðis fara vit eisini at vísa, at kristin tónleikur er minst líka góður sum allur annar tónleikur – hetta er creme de la creme, bæði tey føroysku og tey útlendsku, sigur ein væl nøgdur Eyðun Jacobsen.

Tait er navnið á núverandi bólkinum, sum fyrrverandi limurin úr DC Talk nú spælir í. - Michael Tait var drívmegin í DC Talk og hevur gjørt tey flestu løgini hjá tí bólkinum, harímillum hittið Jesus Freak, fortelur Eyðun Jacobsen.

Terji Vestergaard leggur dent á, at teir hava lagt seg eftir at fáa fatur á nýggjum bólkum, sum eru á veg upp eftir. – Hetta verður eitt tónleikaligt upplivilsi fyri tey vitjandi, sigur Terji.

> "Soleiðis fara vit eisini at vísa, at kristin tónleikur er minst líka góður sum allur annar tónleikur

Men eisini verður tiltakið ætlað familjuni og verður serlig tiltøk fyri børn, har sangur, dansur eisini fara Pingu og Fedemule at vitja verður sagt. Børn undir 12 ár hava ókeypis atgongd á øllum festivalinum.

- Eftir mikið stríð hava vit fingið eitt so stórt navn, sum vit veruliga halda vera nakað serligt. Tait kemur til Føroyar sum tað einasta staðið í Evropa yvirhøvur, sum hann vitjar í summar, sigur Eyðun Jacobsen.

Fyrireikararnir siga seg vænta eini 3-4.000 festivalgestir, so talan er ikki um eitt lítið tiltak. Ætlanin er at hava ein størri pall uttanfyri sjálvan bygningin í Skálabotni. Kommunurnar um Skálafjørðin eru millum stuðlarnar.

## Nøvnini higartil:

Petur Háberg
Proclaim
Nightlight (Skotland)
Ingemar Olsson (Svøríki)
Abide
Vox
Braquet
Tait (USA)




*Tríggir av fyrireikararunum: Terji Vestergaard, Vinjar Johansen og Eyðun Jacobsen*

## Prísir:

390,- fyri báðar dagarnar
280,- fyri ein dag
1. August fer prísurin 100,- upp.
- Um ein bara ynskir at koma á serligu barnatiltøkini: 75,- pr. høvd, men børn undir 5 ár sleppa ókeypis. Við vikuskiftispassið eru barnatiltøkini ókeypis.

# Handilskjarnin í nýggjum skapi

Handilskjarnin er broyttur munandi síðstu tíðina. Deres er flutt oman í Handilskjarnan, eftir at Hans Waag hevur keypt handilin.

Hans Waag eigur Handilskjarnan og Demmus. Eisini eigur hann onkrar handlar í Klaksvík og í Danmark.

- Okkara umsetningur er nærum tvífaldaður síðsta árið. Vit royna at fáa ein størri part av marknaðinum, og vit gera ymsar íløgur, sigur Hans.

Vit vita ikki ordiliga, hvussu vit gera, tá ið umvælingin av SMS verður liðug. Kanska fer Deres niðan aftur í SMS, men tað kann eisini væl verða, at vit finna eina aðra loysn.

Teir arbeiða við onkrari spennandi verkætlan í miðbýnum, men Hans vil ikki siga nakað, áðrenn tað er undirskrivað.

Av handlunum, sum Hans eigur, er Harradeildin í Handilskjarnanum tann við størstu framgongdini hetta síðsta árið. Sámal Joensen er leiðari í Harradeildini, og hann er spentur uppá framtíðina.

- Vit hava fingið nøkur sera góð merki, sum føroyingar veruliga hava tikið væl ímóti. Eg kann til dømis nevna G-Star, Replay, Brubaker, Junk De Luxe, Hummel Fashion, Kawasaki og Matinique. Afturat tí selur Deres millum annað Levis, Diesel, Converse og Frank Dandy.

- Vit hava tikið goymslurúmið niður, so at vit hava eitt nógv størri høli til handilin. Vit hava fríðkað um handilin við ymsum, og vit fáa javnan nýggja vøru, sigur Sámal.

Vit kunnu vænta okkum at hoyra meira frá Handilskjarnanum og Hans Waag í nærmastu framtíð.

*Sámal Joensen er leiðari í Harradeildini í Handilskjarnanum. Hesin veggurin er nýliga gjørdur. Harradeildin hevur havt stóra framgongd hetta síðsta árið. ( mynd Jens Kr. Vang )*




Tíðindaskriv

# Pop Top Konsertin á Ólavsøku

Sum nakað nýtt hava fyriskipararnir handan árligu Pop Top konsertina í Grasagarði valt at royna at knýta tiltakið saman við Ólavsøkukonsertini.

Pop Top konsertin verður tí í ár í staðin í Grasagarði hósdagin tann 27. juli klokkan 14-17.

Konsertin er ein áhugatónleikarakapping fyri ungar tónleikarar, sum fegin vilja sleppa eitt stig víðari. Vinnarabólkurin vil sum vanligt fáa boðið at byrja Ólavsøkukonsertina. Bólkar, sum ynskja at luttaka, hava enn møguleika at tekna seg á telefon 218250.

Tað er felagið Tónaungdómur í samstarvi við Mjólkarvirkið Búnaðarmanna og Føroya Undirhaldstónleikarafelag, sum skipar fyri Pop Top konsertini, og fyriskiparnir vóna, at konsertin í nýggjum hami fer at vera ein upphiting til Ólavsøkukonsertina sjálva, og at hon fer at vera eitt nýtt frískt íkast til býarlívið á Ólavsøku.